# Kalsittholan

Djúpt inni í berginum í Eiði II tunlinum rakti borimaskinan í vár á eina rivu, ið var klødd við kalsitt tinnum. Rivan var í støðum opin, soleiðis at vatn rann úr henni. Í einari rivuholu var funnið sjálvsama stórar tinnur.




# Kalsitt

Kalsitt finst í nógvum grótsløgum, serliga marmari, kálkgrýti og kriti. Kalsitt kemur antin úr livandi verum so sum korallum, æti og skeljadjórum ella úr grundvatni.

Kalsitt er vanliga hvítt, gjøgnumskygd og bleytt. So bleytt, at tilber at skera í tað við knívi. Serligt fyri kalsitt er at tað uppløysist í sýru, so sum edik og saltsýru, og at ljós fer í tvíningar, tá tað fer gjøgnum kalsitt.



*Kalsitt avmyndar stelkin á summardáanum tvær ferðir.*

# Sólsteinur

Hildið verður, at víkingarnir brúktu kalsitt tinnur at seta kós við, tá teir sigldu til Føroyar og Ísland. Var sólin fjald aftanfyri skýggj, kundu teir peila eftir henni við eina kalsitt tinnu, tí dupult myndin frá ljóstvíningini er sjónligast, tá ljóskeldan (sólin) stendur beint aftanfyri tinnuna.

*Víkingar róptu kalsitt fyri sólstein.*

